einfaldari
- ger tað einfaldari
Februar 2011

# Zareptalegan 2011



Árliga samkomulegan hjá Lívdini á Zarepta verður vikuskiftið 11.-13. mars. Hendan legan hevur altíð verið serstøk fyri samkomuna. At koma saman eitt heilt vikuskifti, og at koma hvør øðrum við á ein meiri óformellan hátt, skapir nýggj bond, og vit koma altíð uppmuntrað heim.

Evnið hesaferð verður "Gud hin heilagi", og teksturin fyri vikuskiftið verður Esaias 6. At venda eygum okkara á Gud og síggja, at hann í heilagleika sínum ger okkum til tænarar, sum tæna í heilagleika. Nógv annað verður á skránni, og tað verður kunngjørt seinni.

Legan er ætlað teimum, sum hava gjørt Lívdina til sítt andaliga heim, og tekningin fer fram á heimasíðuni hjá Lívdini. Eingin er teknaður til leguna fyrr enn, tey hava goldið á konto í banka. Upphædd og kontonummar verða kunngjørd á heimasíðuni.

Tað ræður um at tekna seg sum skjótast, tí vit nýta "først til mølle" meginregluna.

Vit gleða okkum til Zareptaleguna!

*JZ*

### Trivnaður og bøn í samkomuni

Trivnaður er í samkomuni, tá ið bøn stendur ovast á øllum virksemi hennara. Øll tiltøk og allar tænastur eiga at verða salvaðar við bøn. Alt byrjar og endar við bøn. Uttan bøn hendir einki í samkomuni – einki, sum hevur ævigan týdning. Ein biðjandi samkoma er ein samkoma, sum skilir, at uttan kraft Guds verður eingin broyting í menniskjum, samkomuni ella samfelagnum. Ein biðjandi samkoma er ein samkoma, sum hevur samfelag við Gud, og sum hevur lært at líta á Hann í øllum. Eitt slíkt hjartans samfelag fer at mynda eina samkomu, sum í eyðmjúkleika og í øllum fylgir vilja Guds.



Ein biðjandi samkoma lítur ikki á førleikarnar og ídnið hjá menniskjum, hóast tað er gott, men hon lítur á, at Heilagi Andin skal leiða samkomuna eftir vilja Kristusar. „Tá ið tey høvdu biðið, skalv staðið, har tey vóru savnað, og tey vórðu øll fylt av Heilaga Andanum; og teir talaðu orð Guds við dirvi.“ (Áp.4:31).

*Jógvan Zachariassen*

## Hendingar & tiltøk

### Øll vælkomin í húsini



Húsini Oman Hoydalar 28 eru nú við at vera klár at taka í brúk. Nógv fólk hevur hjálpt, og arbeiðið hevur gingið væl. Bønarmøtini eru byrjað, og so skjótt, sum alt er liðugt, fara onnur tiltøk í gongd.

Øll eru hjartaliga vælkomin at støkka inn á gólvið, seta seg við eini góðari bók ella drekka ein drekkamunn saman við øðrum, sum eru har.

Vón okkara er, at øll samkoman ognar sær húsini, og at fólk koma regluliga til tiltøk, og tá eingi tiltøk eru.

*JZ*

### Gaither konsert í Tivoli

Sunnukvøldið 13. mars verður Gaither konsert í Tivoli í Keypmannahavn.

Tað eru amerikansku hjúnini Bill og Gloria Gaither, sum við bólki sínum "Gaither Homecoming Friends" fara at syngja. Føroyska ferðavinnuskrivstovan Faroe Travel skipar fyri ferð til konsertina. Farið verður við flogfari úr Føroyum fríggjakvøldið 11. mars og heimaftur mánadagin. Konsertin verður í Glas-salinum í Tivoli. Talan verður bert um eina konsert, sum verður í tríggjar tímar. Tekning hjá Faroe Travel á tel. 34 26 00.



### Fundur fyri kyknubólkaleiðarar

Fundur fyri leiðarar í kyknubólkunum verður mánadagin 14. februar kl. 20 í húsunum hjá Lívdini oman Hoydalar 28. Á skránni verður m.a. kjak um endamálið við kyknubólkum í Lívdini.

### Samkomuveitslan avlýst

Árliga samkomuveitslan hjá Lívdini, sum skuldi vera leygarkvøldið 29. januar í Oasuni, varð avlýst, av tí at ov fá høvdu teknað seg.

### Ókeypis bowling



Fólk í Lívdini hava fram til 1. apríl 2011 møguleika at bowla ókeypis í bowlinghøllini hvønn mánadag frá kl. 20.00 til 22.00. Bowlingbreytir verða bílagdar við at ringja til Mourits Clementsen á tlf. 224717.

### TeenStreet 2011




Altjóða kristna legan TeenStreet verður í býnum Offenburg í Týsklandi frá 30. juli til 6. august. Í fjør vóru yvir 300 føroyingar á Teenstreet. Les meira á www.teenstreet.fo.

### Skeið í trúarverju

Frá 21. til 25. februar verður skeið í trúarverju á Zarepta, har til ber at fáa spurningar svaraðar sum t.d. Er Gud til? Er Jesu uppreisn søgulig? Hví loyvir Gud lýðing? Lær um vísund, skapanina, menning, kjakhættir o.s.fr. Aldursmarkið er 17 ár, og skeiðið kostar kr. 950 fyri einstaklingar og kr.1700 fyri pør. Tilmelding fer fram á www.om.fo.



### Karl Robert givin sum OM leiðari



Danska blaðið OM Danmark skrivar, at Karl Robert Vang er givin sum leiðari hjá OM í Føroyum. Hann og konan Jeany eru saman við børnunum flutt til Hollands at búgva. Blaðið skrivar, at Shamila og Høgni Johannesen eru komin við í arbeiðið hjá OM í Føroyum, har tey arbeiða sum eitt toymi saman við føroysku hjúnunum Anitu og Oddmar Tausen og Ruth og Thorvald Gaardlykke.

Yvir 5.400 fólk arbeiða fyri OM (Operation Mobilisation) í yvir hundrað londum í øllum heiminum við at hjálpa fólki og boða Guds orð. Tað er OM, sum eigur trúboðanarskipið Logos Hope, sum er gamla Norröna.

## Skráin fyri møtini í Skúlanum við Løgmannabreyt

**Sunnudagin 6. februar**

Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Evni: Í fótasporum Jesusar*
*Talari: Jógvan Zachariassen*

Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: Hugmóð og eyðmjúkleiki*
*Talari: Jógvan Zachariassen*



Jógvan

**Sunnudagin 13. februar**

Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Kreativt familjuinnslag*
*v/ sang- og tónleikabólkinum T.O.S.*

Lovsongur og tala kl. 12.00: *Sang- og tónleikabólkurin T.O.S.*

**Sunnudagin 20. februar**

Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Videobrot frá fam. Mortensen*

Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 12.00: *Evni: Alt Gudi til dýrd:*
*Rómbrævið 15:1-7*
*Talari: Jógvan Zachariassen*



Familjan Mortensen

**Sunnudagin 27. februar**

Familju- og tilbiðjanarmøti kl. 10.30: *Kreativt familjuinnslag*

Lovsongur og tala kl. 12.00: *Evni: Heidningalovsongur:*
*Rómbrævið 15:8-13*
*Talari: Jógvan Zachariassen*

**Ungdómstiltøk:** Alive: leygarkvøld kl. 21.00



Sang- og tónleikabólkurin T.O.S.

** Fyrivarni verður tikið fyri broytingum í skránni*

*Útgevari: Samkoman Lívdin · www.livdin.fo · faldarin@livdin.fo · Uppseting: Astrid Mouritsen · Ábyrgd: Magnus Gunnarsson*